## Gomes vil aftur til PSV

Tað hevur gingið heldur misjavnt hjá málmanninum Heurelho Gomes, síðani hann skifti til Tottenham at spæla. Um vikuskiftið spældi Gomes heilt væl, men hann hevur eisini havt fleiri misjøvn avrik. Venjarin hjá Tottenham, Harry Redknapp, vil hava ein nýggjan málmann til felagið at kappast við Gomes, men kanska fer Gomes aftur til PSV, haðani hann kom. Stjórin í PSV sigur, at Gomes vil aftur til teirra at spæla.




## Cicinho á veg heim

Tað gongur einki serligt hjá brasilska verjuspælaranum Cicinho í italska felagnum AS Roma, og nú verður tosað um, at Cicinho er á veg heimaftur til Brasil. Cicinho spældi fyri Real Madrid, men skifti í summar til Roma. Nú verður sagt, at Santos í Brasil er áhugað í at keypa Cicinho leysan av sáttmálanum við Roma, og venjarin hjá Santos vil gjarna hava Cicinho á sítt lið.



*Tað hevur gingið striltið hjá Frem í ár, men persónliga hevur Atli Danielsen staðið seg framúr, og nú kann hann eisini erpa sær av heitinum sum ársins spælari í felagnum í ár*

# Atli er bestur í Frem

**Leygardagin varð Atli Danielsen valdur at vera ársins spælari í Frem, har venjarin gevur honum tað skoðsmál, at hann – umframt at vera góður við bóltinum – eisini er fínur pressspælari, sum fevnir um stórt øki av vøllinum**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Umframt at vera ein góður liðfelagi, so er Atli eisini ein spælari, sum altíð gevur seg heilt. Bæði tá ið vit venja, og tá ið vit spæla dystir, er hann væl fyrireikaður.

Hetta vóru nøkur av rósandi orðunum, sum Frem venjarin, Anders Theil, leygarkvøldið, tá ið Frem hevði jólaborðhald, hevði at geva føroyska landsliðsspælaranum, Atla Danielsen, sum venjararnir og leiðararnir hjá danska 1. deildarliðnum høvdu kosið at vera besta Frem spælara í 2008.

Tað ber ikki til at siga annað, enn at tað hevur gingið skjótt hjá Atla Danielsen at vinna seg upp á tindin í Frem: 1. apríl í fjør spældi hann fyrstu ferð á liðnum. Higartil hevur hann spælt 55 dystir, og hann hevur skorað trý mál. Fyri tað mesta spælir Atli á miðvøllinum, men onkra ferðina hevur hann verið í miðverjuni.

Í grundgevingini fyri at kjósa føroyska landsliðsspælaran at vera tann besta í 2008, varð tikið soleiðis til:

- Tað verður ikki altíð lagt so nógv til merkis, hvønn leiklut Atli hevur, sjálvt um hann megnar at vera alla staðni, har tað gongur fyri seg. Uttan mun til hvussu tað gongst, so stríðist Atli, inntil dómarin hevur bríkslað fyri síðstu ferð. Harafturat er Atli ein klókur og taktiskt stinnur spælari, sum er sera tilvitaður um tað, sum gongur fyri seg, og hann dugir væl at taka rættar avgerðir. Hann sparkar væl við báðum beinum, og støðið í fyrstu nertingunum hjá honum er høgt. Hann er góður í samanspælinum, og so er hann so vælsignað róligur í spælinum, søgdu Frem ábyrgdarpersónarnir, sum løgdu afturat:

- Atli Danielsen hevur verið framúr í 2008, sum annars hevur verið eyðkent av nógvum turbolensi. Aftur og aftur hevur hann gingið á odda, tá ið tað skuldi stríðast fyri at fáa týdningarmikil stig á kontina. Hann hevur avgjørt ikki spart seg sjálvan.

Tí hevur tað verið upplagt hjá okkum at kjósa Atla Danielsen til besta Frem spælaran í 2008, søgdu venjararnir og leiðararnir í Frem í síni grundgeving, tá ið teir undir jólaborðhaldinum leygardagin kunngjørdu valið av ársins spælara.

Liðfelagarnir fegnaðust saman við føroyska landsliðsspælaranum, sum teir væl og virðiliga untu heiðurin av verða kosin besti spælari.

Hetta er aðru ferð, at føroyskur landsliðsspælari verður kosin at vera ársins spælari í Frem. Í 2005 var sami heiður vístur Jón Róa Jacobsen, sum síðani í summar aftur er í Frem, eftir at hann í tvey ár spældi í AaB.

Setningurin hjá Atla Danielsen og liðfeløgunum verður at halda tørn um plássið í næstbestu donsku deildini. Eftir 15 av 30 umførum er Frem á 8. plássi við 18 stigum. Nummar 14, 15 og 16 flyta niður. Í løtuni er felagið hjá Toda Jónsson, FC Amager á 14. plássi við 14 stigum. Tað vil siga, at tað eru fýra stig frá Frem og niður til strikuna.

## Bíðar við at skriva sáttmála

**Sáttmálaskeiðið hjá Atla Danielsen í Frem verður liðugt í summar, men føroyski landsliðsspælarin kennir ikki skund á sær at skriva undir nýggjan sáttmála**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sáttmálaskeiðið hjá Atla Danielsen í Frem verður liðugt 30. juni í 2009. Eingin ivi man vera um, at teir í felagnum fegnir vilja tryggja sær undirskriftina hjá føroyska spælaranum, men tað verður í hvussu so er ikki nú beinanvegin, at Atli fer at skriva undir nýggjan sáttmála við Frem:

- Eg rokni við, at eg fari at bíða eitt sindur við tí. Tað eru tað fleiri orsøkir til. Ein er, at eg í summar verði liðugur við útbúgvingina. Eg havi ikki tikið endaliga støðu til, um eg fari at halda fram við útbúgvingini her í Keypmannahavn, ella um eg skal halda fram við útbúgvingini onkra aðra staðni, ella um eg skal brúka meiri tíð upp á fótbóltin.

Hvat droymir tú um?

- Sjálvsagt hevði tað verið spennandi og stór avbjóðing, um tað hevði eydnast at skrivað sáttmála við okkurt felag í superliguni og harvið at fingið møguleika at vant fleiri ferðir um dagin. Men tað er ikki bara sum at siga tað, tí tað eru nógvir um boðið og kappingin er stór, staðfestir lítið lætni klaksvíkingurin.

Besta fótbóltsdeildin í Danmark er geografiskt skeiklað soleiðis at skilja, at tað lutfalsliga eru fá feløg í høvuðsstaðarøkinum og fleiri í provinsini. Í Keypmannahavn og økinum rundanum eru tað stórfeløgini Brøndby og FCK og so FCN, sum heldur til í Farum. OB er á Fyn, og øll hini átta feløgini eru í Jyllandi.

- Kappingin er serliga stór her í Keypmannahavn. Men um tilboð hevði komið frá einum av feløgunum í provinsini, so hevði eg sjálvandi umhugsað tað, sigur Atli Danielsen, sum í eitt stutt skifti fyri nøkrum árum síðani royndi seg í Sogndal í Noregi. Annars hevur hann bara umboðað KÍ og síðani 1. apríl 2007 Frem, sum leygardagin boðaði frá, at Atli í 2008 hevur verið besti spælarin í felagnum.

Feløgini í Jyllandi í superliguni eru FCM, AGF, AaB, Randers FC, SønderjyskE, Esbjerg, Vejle og Horsens.